UTTAN ÚR HEIMI

## Hópmorð skal kannast

Trygdarráðið hjá ST krevur nú, at tað verður kannað, hvør hevði ábyrgdina av einum hópmorði í Lýðveldinum Kongo í síðstu viku.

Um vikuskiftið boðaðu ST-umboð í Lýðveldinum Kongo frá, at minst 1.000 fólk vóru deyð í samanbrestum millum tveir ættarbólkar í landnyrðingspartinum av landinum. Sambært ST-umboðunum eru einar 20 hópgravir funnar síðani, og fleiri særd fólk liggja eisini á sjúkrahúsi. Hópmorðið vardi tríggjar dagar.

ST hevur sett ugandiskar hermenn at tryggja lóg og landaskil í landnyrðingspartinum av Lýðveldinum Kongo, men hermenninir megnaðu ikki at forða hópmorðinum. Nú krevur ST, at tað verður kannað, hvør hevði ábyrgdina av hópmorðinum.

## Til Russlands á fund

ST-aðalskrivarin, Kofi Annan, fer um vikuskiftið til Russlands. Har skal hann hitta Vladimir Putin, forseta, Jacques Chirac, forseta í Fraklandi og Gerhard Schrøder, kanslara í Týsklandi.

Evnið á fundinum er støðan í Irak og serliga, hvat skal henda, tá kríggið har er liðugt. Tað vóru júst Russland, Frakland og Týskland, sum forðaðu fyri, at USA og Bretland fingu stuðul frá ST til at leypa á Irak.

Franski forsetin hevur sagt, at ST eigur at standa á odda fyri endurreisingararbeiðinum í Irak aftan á kríggið. Á fundinum í Belfast fyrradagin samdust George W. Bush, forseti og Tony Blair, forsætisráðharri um, at ST skal hava ein leiðandi lut í endurreisingararbeiðinum.

## Ikki mannað enn

Mahmoud Abbas, sum herfyri varð tilnevndur palestinskur forsætisráðharri, hevur framvegis ikki mannað stjórnina.

Ætlanin var, at hann skuldi almannakunngera ráðharralistan í hesari vikuni, men í gjár søgdu palestinskar keldur, at tað fer at taka einar fjúrtan dagar afturat at manna stjórnina. Aðrar keldur siga, at arbeiðið at manna stjórnina hevur tikið longri tíð enn væntað, tí Mahmoud Abbas og palestinski forsetin, Yasser Arafat, eru ósamdir um, hvør skal sita í nýggju stjórnini.

ST, ES, USA og Russland hava boðað frá, at tey fara at leggja eina friðarætlan fyri Miðeystur fram, so skjótt tann nýggja palestinska stjórnin er skipað.

## USA flytir

Amerikanska herleiðslan hevur gjørt av at flyta amerikansku høvuðsstøðina í Suðurkora úr høvuðsstaðnum Seoul til eitt annað stað í landinum, og hetta skal gerast sum skjótast.

Hetta varð avgjørt á einum fundi fyrradagin millum varaverjumálaráðharrarnar hjá teimum báðum londunum.

USA hevði eisini skotið upp at flyta tær amerikansku herdeildirnar, sum hava støð við norðurkoreanska markið, burtur frá markinum, men hetta uppskotið samdust ráðharrarnir ikki um. USA hevur 37.000 hermenn í Suðurkorea.

# Bardagin um Bagdad verður ikki tann seinasti

**Saddam Hussein tykist vera ringur at raka. Eftir øllum at døma slapp hann undan teirri fjórðu amerikansku royndini at beina fyri honum.**

KRÍGGJ Í IRAK
*Árni Joensen*

Alt bendir á, at tær fýra 900 kilo tungu bumburnar, sum eitt amerikanskt flogfar tveitti eftir Saddam Hussein mánadagin, raktu ikki tað ætlaða málið. Bumburnar vóru ætlaðar einum húsum, sum CIA hevði sagt, at Saddam Hussein og synir hansara vóru í. Húsini vórðu javnað við jørðina, men bretskar fregnartænastukeldur søgdu í gjár, at irakski forsetin var eftir øllum at døma farin haðani, áðrenn amerikansku bumburnar dalaðu niður úr luftini.

Vesturlendskir hernaðarserfrøðingar siga, at amerikanararnir fara at halda fram við leitingini eftir Saddam Hussein, og finna teir hann ikki í Bagdad, fara teir helst at leita aðrastaðni.

Tað eru eisini fleiri, sum halda, at irakski forsetin fer úr Bagdad í somu løtu, sum hann ikki kennir seg tryggan har longur. Hildið verður, at hann fer at flýggja til býin Tikrit, haðani hann er ættaður. Tikrit er 160 kilometrar norðan fyri Bagdad, og sum er hevur irakski forsetin ongar trupulleikar við at sleppa tann vegin, tí har eru eingir amerikanskir hermenn.

USA hevur bert nakrar fáar túsund hermenn í Norðurirak, men ein deild við 30.000 hermonnum er farin úr Kuwait og hevur sett kós ímóti júst Tikrit. Tí er tað væl hugsandi, at tann seinasti bardagin í Irak-kríggnum verður ikki um Bagdad, men um Tikrit.

# Sjúkrahúsini eru á tremur



*Her liggur ein særdur maður og bíðar eftir viðgerð. Skurðlæknarnir á sjúkrahúsunum í Bagdad noyðast at arbeiða alt samdøgrið.*

**Hvønn dag koma fleiri hundrað særdir irakar á sjúkrahúsini í Bagdad. Støðan er stutt sagt ræðulig, sigur heimsheilsustovnurin WHO.**

KRÍGGJ Í IRAK
*Árni Joensen*

Umboð hjá Reyða Krossi, sum eru í Bagdad, hætta sær ikki at vitja øll sjúkrahúsini í býnum, tí tað er alt ov vandamikið orsakað av áhaldandi skotbardøgum millum amerikanskar og irakskar hermenn.

Fyrradagin eydnaðist umboðunum kortini at sleppa til sjúkrahúsið Al-Kindi, hóast bardagarnir leikaðu á allastaðni við sjúkrahúsið. Tað vísti seg, at viðurskiftini inni á sjúkrahúsinum vóru verri, enn nakað av umboðunum hevði torað at ímynda sær.

– Støðan er snøgt sagt ræðulig. Skurðlæknarnir arbeiða dag og nátt, og flestu teirra eru deyðatroyttir, segði ein talsmaður hjá Reyða Krossi aftan á vitjanina. Hann dugdi ikki at siga, hvussu nógv særd fólk vóru á sjúkrahúsinum, men segði, at leiðslan hevði langt síðani mist tamarhaldið á støðuni.

Frá leiðsluni fekk Reyði Krossur at vita, at teir seinastu 24 tímarnar vóru 176 særd fólk komin hagar umframt fýra, sum longu vóru deyð. Samstundis visti Reuters tíðindastovan at siga, at á einum øðrum sjúkrahúsi, sum er har norðuri í Bagdad, høvdu tey tikið ímóti 141 særdum og 18 deyðum irakum tað sama samdøgrið.

Sambært Reyða Krossi er trot á næstan øllum. Sjúkrahúsini hava alt ov lítið doyvingarevni, útgerðin til skurðviðgerðir er gomul og slitin, stórt trot er á at kalla øllum heilivági.

Ein tíðindamaður hjá Reuters, sum var uttan fyri eitt av líkhúsunum í Bagdad mánadagin, segði, at nógv lík lógu og sløgdust uttanfyri í plastikkposum.



# Rennur og rennur foli mín

**Vága Ríðingarfelag er virkið felag. Nú er felagið farið undir at gera ríðibreyt við flúgvarabedingina Niðri við Vatn**

RÍÐING
*Edvard Joensen*



*Teir gera nýggju ríðibreytina við flúgvarabedingina Niðri við Vatn*

*Mynd: Edvard Joensen*

**Vágar:** Nýggj ríðibreyt verður gjørd í Vágum. Talan er um ringbreyt, sum í fyrsta lagi er ætlað til gongulagskappingar, siga tey í Vága Ríðingarfelag.

Vága Ríðingarfelg er virkið felag, sum regluliga hevur bæði kappríðing og nú eisini ætlandi gongulagskappingar á skránni.

Vanliga plagar stevna at verða hildin Niðri við Vatn, har bæði kappríðing og eisini felagshugni eru á skránni.

Nú farið er undir at gera nýggja ringbreyt til gongulagskappingar, rokna tey eisini við í Ríðingarfelagnum, at hon verður liðug til stevnuna i summar.

Nýggja breytin er løgd við flúgvarabedingina, tey nevna í Vágum. Tað er norðarlaga við Sørvágsvatn stutt frá vegnum til flogvøllin og Sørvágs.

Sum skilst á teimum i Vága Ríðingarfelag, er felagið rímiliga væl fyri, og ein slík breyt, sum tann, ið nú verður gjørd, verður ikki nøkur tyngjandi íløga fyri felagið. Hvør endaligi kostnaðurin verður, ber ikki til at fáa upplýst, men sum skilst verður arbeitt rímiliga biliga. Tó skulu bilar og maskinur sjálvandi hava sítt, verður sagt.

Tað er stórur áhugi fyri ríðing í Vágum. Eini 50-60 ross munnu vera í oynni, halda tey í Ríðingarfelagnum. Nógv eru íslandsross, sum serliga eru vælegnað til gongulagsríðing.

Vágar eru væl egnaðar at ríða í, siga rossafólkini. Tað vísir eisini áhugin aðrastaðni frá at koma vestur í Vágar at ríða. Tað er rímilig vanligt, at havnarross eru at síggja í Vágum, har riðið verður á fjøllunum. Eisini saman við vágafólki, ið sum vera man gera nógv av at ríða kring oynna. Serliga um summarið. Fjallavatn verður dúgliga vitjað, og eins og Seyðamaðurin á Sondum reið á sinni, verður eisini onkur túrur gjørdur Norðuri á Fjøllum.

Nú undirsjóvartunnilin er komin, vænta tey enn fleiri vitjanir har vesturi, siga reiðfólkini. Nú er einki fyri at ferðast imillum.

Men tað merkir sjálvandi eisini, a t vágafólkini hava betri møguleikar fyri at sleppa av oynni, og tí møguleikanum vænta tey eisini, at tey fara at taka av.


Kassafólk
til bakaran í SMS

Til bakaran í SMS søkja vit eftir kassafólki at arbeiða sum feriuavloysari frá 12. mai til 31. august 2003.

Arbeiðstíðin er sett til 3/4 tíð.

Løn sambært galdandi sáttmála.

Er hetta nakað fyri teg, so ring til Miklagarð á tel 31 30 11 og spyr eftir Johnny Priess.

*Miklagarður er størsti matvøruhandil í Føroyum við eini gólvvídd upp á 1700 fermetrar og við meira enn 10000 vørunummrum. Í Miklagarði starvast uml. 80 fólk.*

MIKLAGARÐUR
SMS • Postboks 1069 • 110 Tórshavn • Tel 31 30 11



